# Her búgva tey fýra

## A + 2



**BEN ARABO BÝR OG STARVAST Í LONDON.**
Teirra stílur er modernaður.
– Ein stova er eitt rúm, har fólk skulu kenna seg væl og heima uttan at vera bangin fyri, um tað seinasta, sum er sett á bókahillina, nú eisini passar til. Okkum dámar væl at lesa, so tað hevði verið óhugsandi at havt eina stovu við ongari ordiligari bókahill.

## C + 4



**RIGMOR N. ARGE – RENNARI OG SÁLARFRØÐINGUR**
Rigmor N. Arge býr saman við familjuni í Ås sunnan fyri Oslo. Henni dámar væl, tá ið heimið er einfalt og stílreint við svørtum, hvítum og træi. Innbúgvið er fyri tað mesta slíkt, sum tey hava keypt gjøgnum tíðina. Henni dámar væl modernaða list, og kundi hugsað sær at átt meira.

## D + 3



**ANNA KIRSTIN THOMSEN, PUBEIGARI OG LÍVSSTYKKI Á TVØROYRI**
Anna Kirstin sigur, at stovan hevur sum so ongan stíl, men er hugnalig og hevur gott útsýni .
– Eg eri ógvuliga líkasæl um stíl og sovorðið. Men eg eigi nógv pen ting, og havi eg sett tey eitt stað, har tey rigga, so verða tey standandi, sigur Anna Kirstin.

## B + 1



**GESTUR HOVGAARD, GRANSKARI Í KLAKSVÍK**
Stílurin í stovuni er eitt sindur robustur, og teimum dáma væl list. Møblarnir eru rættiliga nýggir, og eru slíkir sum tey hava ynskt sær og síðani keypt. Stovurnar eru býttar upp í trý; hendan við sofuni, sjónvarpsstovan og so ein við nógvum bókum og líknandi.

